Tilmæli

17. desember 2012

# Førleikamenning – tørvur og skipan

Fólkaskúlaráðið

Tilmæli frá Fólkaskúlaráðnum um tørv á førleikamenning og skipan

Karolina Matras

______________________________

Marjun Ziskason

______________________________

Jenny Lydersen

______________________________

Tonnie Strøm

______________________________

Andrass Henriksen

______________________________

Jónleif Johannesen

______________________________

17. desember 2012

## *Innihald*

*Formæli* ____ 4

*Inngangur* ____ 7

*1.0. Tørvur á førleikamenning* ____ 8

*2.0. Førleikaskeið* ____ 16

*3.0. Menning av serútbúgvingum* ____ 19

*4.0. Ábyrgd og skipan av førleikamenning fólkaskúlans* ____ 26

*Bókmentir* ____ 31

# Formæli

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, setti Fólkaskúlaráðið 1. februar 2011. Limirnir í ráðnum eru valdir eftir serkunnleika innan ymisk starvsøki í fólkaskúlanum, og hevur ráðið samsvarandi hesum býtt ábyrgdina av økjunum sínámillum.

Bjørn Kalsø tók við sum landsstýrismaður í mentamálum 14. november 2011, og hevur hann heitt á Fólkaskúlaráðið um at halda áfram við tí arbeiði, sum sjøtul er settur á.

Í samgonguskjalinum hjá núverandi samgongu verður staðfest, at ein góður skúli er grundarsteinurin í samfelagnum, og at landsins skúlaskapur skal tryggja øllum holla útbúgving, handaliga sum andaliga, har øll skulu hava møguleika at vinna sær útbúgving. Eisini verður sagt, at eftirútbúgving av lærarum skal raðfestast høgt.

Uppgávan hjá Fólkaskúlaráðnum er sambært § 58 í fólkaskúlalógini at veita landsstýrismanninum ráð í øllum málum um fólkaskúlan. Harumframt kann Fólkaskúlaráðið ráða landsstýrismanninum til at seta í verk royndar- og menningarvirksemi og gransking viðvíkjandi fólkaskúlanum.

Ráðið hevur arbeitt við nøkrum høvuðsøkjum, har herðsla er løgd á at koma við tilráðingum um, hvat eigur at verða gjørt fyri at skapa umstøður fyri fakligari og námsfrøðiligari menning í fólkaskúlanum, so allir partar, t.e. næmingar, lærarar og leiðsla, kunnu virka í einum fakliga mennandi umhvørvi.

Hetta tilmælið viðger eftirútbúgvingartørv og skipan, sum er eitt av høvuðsøkjunum, Fólkaskúlaráðið hevur arbeitt við, og metir ráðið, at eftirútbúgving er ein høvuðsháttur í arbeiðinum at menna fólkaskúlan. Samfelagið er í støðugari

broyting. Nýggj tøkni og nýggj vitan, bæði faklig og námsfrøðilig, gerst alsamt meira átrokandi, og má skúlin verða førur fyri at meta um, skilja, nýta og tillaga seg hesar støðugu broytingar. Tað er tí so umráðandi, at bæði lærarar og leiðsla fáa íblástur og fáa ment sínar fakligu og undirvísingarligu førleikar, eins og skúlin kann gera sítt til, at børn og ungdómur okkara ogna sær fakligar og persónligar førleikar at virka í og mynda framtíðar samfelag okkara.

Arbeiðshátturin hevur verið, at  uppskot eru skrivað og send limunum í ráðnum at viðgera og koma við viðmerkingum. Síðani hevur Fólkaskúlaráðið umrøtt uppskotini v.m. á fundum. Broytingar eru gjørdar samsvarandi viðmerkingum og niðurstøðum hjá ráðnum.

Í Fólkaskúlaráðnum eru:

Karolina Matras, undirvísari og granskari, er forkvinna

Marjun Ziskason, lærari og ritstjóri, er skrivari

Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, er samskipari

Hinir nevndarlimirnir eru:

Tonnie Strøm, lærari og lesivegleiðari

Andrass Henriksen, skúlastjóri

Jónleif Johannesen, lærari og AKT lærari

Mai Laksafoss, Felagið Heim og skúli

# Inngangur

Fólkaskúlin skal møta næminginum, har hann er staddur bæði sosialt og fakliga. Sum tíðirnar broytast, broytist eisini samleiki næminganna. Fyri at lærarin skal megna hesa uppgávu, er tað neyðugt, at lærarin støðugt mennir sínar førleikar. Útbúgvingin eigur at verða endurskoðað og dagførd við jøvnum millumbili. Um føroyski fólkaskúlin skal mennast, so mugu øll starvsfólk í fólkaskúlanum mennast. Tí er neyðugt at skipa eina fjølbroytta førleika-menning, ið tekur hædd fyri øllum fakøkjum, umframt námsfrøði, sálarfrøði og didaktikki.

Heitið førleikamenning umboðar í størri mun veruleikan og tørvin á fólka-skúlaøkinum enn eftirútbúgving, tí um fólkaskúlin skal røkka teimum fjølbroyttu og krevjandi avbjóðingum, ið settar verða nútíðar skúlanum, mugu lærarar og leiðsla áhaldandi førleikamenna seg. (Talis-tilmælið, 2010 & Hansen, 2012).

Hetta tilmælið er eisini grundað á aðrar kanningar, tilmæli og uppskot, t.d. "Fólkaskúlalógin ein avbjóðing" (2001) og "Tilmæli frá Pisa-arbeiðsbólkinum" (2006). Fundir hava verið við Magnus Tausen, stjóra í Námi, Herálv Jacobsen, formanni í Føroya Lærarafelag, Hans H. Hansen og Janus Jensen, undirvísing-arleiðarar á Námsvísindadeildini á Fróskaparsetri Føroyar, Tóru Tóroddsdóttir, fysioterapeuti, Andrass Róin, leiðara, og Maluna Ludvig, cand.mag.pæd.

Við støði í hesum er tilmælið "Førleikamenning – tørvur og skipan" gjørt og lýsir fyrst tørvin á førleikamenning innan skúlaøkið. Síðan verður komið nærri at sjálvari førleikamenningini í líki av skeiðum, serútbúgvingum v.m. At enda verður mælt til skipan og ábyrgd av førleikamenningarøkinum.

# 1.0. Tørvur á førleikamenning

Tá ið tosað verður um lærarafførleikar, so byrjar læringin ikki, tá ið ein lesandi verður innskrivaður á Námsvísindadeildina, og hon endar ikki, tá ið hesin sami hevur lokið prógv sum lærari fýra ár seinni.

Á Námsvísindadeildini kann tann lesandi ogna sær:

- ein byrjanarførleika, so at nýútbúni lærarin er førur fyri at fara undir lærarayrki
- amboð, so at nýútbúni lærarin er førur fyri at læra seg tað, ið hann ikki lærdi á Námsvísindadeildini
- møguleika at koma á førleikamennandi útbúgvingar og skeið við jøvnum millumbili, so at undirvísingarførleikarnir støðugt verða mentir og altíð hóska til tíðina og tær avbjóðingar, ið koma.

Tað eru alsamt fleiri skúlagranskarar, sum í dag knýta lærarayrkið og lærarafførleikan til hugtakið "lívlong læra". Hetta merkir, at lærarar støðugt mugu og eiga at læra at menna og skipa eina miðvísari og betri undirvísing.

Nógv førleikaøki eru, ið lærarar støðugt kunnu menna, t.d. førleikin at leggja undirvísing til rættis, at fremja undirvísing í verki, at eftirmeta undirvísing, at laga undirvísing til tørvin hjá einstaka næminginum, at skapa eina natúrliga progressión í undirvísingini, at draga tíðarhóskandi temu og tekstir inn í undirvísingina o.m.a.

Eingin undirvísingarsiðvenja verður kollvelt av, at 25-30 nýútbúnir lærarar fáa starv í 20 ymiskum skúlum um árið. Skulu vit styrkja fólkaskúlan, so er munabesta loysnin at førleikamenna lærarar úti í økjunum um alt landið.

Tess fleiri undirvísingarroyndir ein lærari hevur, tess betur møguleika hevur hann at skipa, fremja og eftirmeta undirvísingargongdir. Um stígur ikki skal koma í, er neyðugt, at lærarin gerst partur av einum hugkveikjandi umhvørvi, har undirvísingarspurningar verða greiddir og greinaðir, og har didaktisk nýhugsan støðugt verður havd til umrøðu og viðgerðar. Tískil er eitt fjølbroytt førleikamennandi tilboð til føroyskar lærarar eitt gott forum til júst hetta endamál.

Beinleiðis tørvurin á førleikamenning í føroyska fólkaskúlanum er ikki nógv lýstur. Talis-kanningin frá 2010 og kanning av metanini hjá nýútbúnum lærarum, (Hansen, 2012) siga m.a., at náttúra og tøkni er millum tær lærugreinar, ið mugu raðfestast høgt, tá talan er um førleikamennng. Tað er týdningarmikið at lýsa tørvin á førleikamenningini í fólkaskúlanum, áður enn støða verðir tikin til, hvussu raðfestast skal. Spurningar, ið lýsa tørvin á førleikamenning, eiga at vera fastur partur av komandi Talis-kanningum.

## *1.1. Nýggjar eftirútbúgvingar*

Nakrar eftirútbúgvingar vanta í fólkaskúlaskipanini, og aðrar eiga at dagførast. Vit mæla til, at hesar verða skipaðar og bjóðaðar út.

### *1.1.1. Støðisførleikar*

Í allari undirvísing og tí eisini í førleikamenningini eiga lærarar at taka atlit at teimum støðisførleikum, ið nevndir eru í Námsætlanini fyri fólkaskúlan. Førleikamenningin skal taka atlit at, hvussu støðisførleikarnir at virða, at samskifta, at kanna og at skapa verða tiknir við í undirvísingina. Støðis-førleikarnir eru grundvøllurin, ið fólkaræði byggir á. Tí skal undirvísingin stimbra hugin at læra og geva sítt íkast til kjak og loysnir, at virða og virka fyri góðari samveru millum menniskju og fyri góðum samanspæli millum menniskju, náttúru og umhvørvi.

Virðing fremur tryggleika og trivnað, ið eru fortreytir fyri gagnligari menning. Undirvísingin skal virka fyri, at hvør einstakur næmingur verður sæddur og hoyrdur, og at hann kennir seg at hava virði og týdning. Undirvísingin skal menna næmingin at bera fram hugsanir sínar munnliga og at lesa og skriva. Næmingurin skal stimbrast í at eygleiða, undrast, finna svar og gera royndir. Undirvísingin skal eisini læra næmingin at menna forvitni, spæl og hugflog. Næmingurin skal læra at hugsa, tala og skriva sjálvstøðugt og at menna hugskot síni, og hann skal kenna seg at hava ein virknan lut í egnari menning og læring (Námsætlan til fólkaskúlan, 2011).

### 1.1.2. Grundleggjandi lesi- og skriviundirvísing

Eftirútbúgving av lærarum í forskúlum og innskúlingini má taka atlit at føroyska barninum, har barnarímur, skjaldur, føroyskur dansur/spøl og onnur viðkomandi stimbran skal vera ein týðandi partur av menningini í barnsins gerandisdegi heima og í skúla (Debess, 2006). Serliga stuðlar tílíkt virksemi upp undir málsliga menning og tankavirksemi, sum liggur til grund fyri góðum og grundleggjandi lesi- og skriviførleika.

Luttakararnir, sum førleikamenna seg innan grundleggjandi lesi- og skriviundirvísing, skulu ogna sær førleikar, sum fevna um móðurmálsundirvísing í byrjanarflokkunum við denti á málmenning, lesing og skriving. Tey skulu fáa kunnleika um týdningarmikil ástøði um serliga málmenning, lesing, skriving og lesitrupulleikar. Dentur eigur at vera lagdur á at knýta hetta saman við dagliga arbeiðnum sum fólkaskúlalærarar.

Evnini, sum tey skulu førleikamenna seg í, eru móðurmálið, og hvussu málið háttar sær, móðurmálið í heimi og skúla, móðurmálsundirvísingin í byrjanarundirvísingini, málslig tilvitan sum fyritreyt fyri lesing, lesi- og skrivihættir, ymisk eftirmeting, grundarlag undir fakligari lesing, fyritreytir at skilja tað, sum

lisið verður, arbeiðshættir, góðir lesi- og skrivivanar og uppdagandi skriving og lesitrupulleikar.

Dentur skal leggjast á at læra um mál og skriftmál sum grundarlag undir lívslongu menning okkara sum menniskju. Luttakararnir skulu ogna sær grundleggjandi innlit í lesitilgongdir, lesiognan, lesimenning, lesifatan og ymisk snið av lesitrupulleikum. Eisini skulu tey hava innlit í skrivi- og stavimenningina, harímillum sambandið millum lesing og skriving, og hava ognað sær innlit í málsligu menning barna. Luttakararnir skulu læra at nýta innlitið, tey fáa, í verki og kunna lýsa vandamál í lesi- og skriviundirvísing við støði í almennum innliti í lesing.

### 1.1.3. Samfelagsfrøði

Samfelagsfrøði er í dag ein linjugrein á Námsvísindadeildini, ið er ætlað til undirvísing í samtíð og samfelagsfrøði. Fakliga støðið er bachelor, soleiðis at tað í sær sjálvum er nøktandi til undirvísing á c-stigi á miðnámi.

Undirvísingin er skipað í trý faklig grundskeið: eitt stjórnmálafrøðiligt, eitt samfelagsfrøðiligt (sociologiskt) og eitt búskaparfrøðiligt, men hesi øki verða viðgjørd á bæði innlendis og altjóða stigi. Stjórnmálafrøðiliga fakøkið umfatar í løtuni m.a. politikk, fólkaræði, fyrisiting, millumlanda viðurskifti og miðlar. Sociologiska fakøkið umfatar í løtuni m.a. familjulív, arbeiðslív, modernitet, mobilitet og marginalisering. Búskaparliga fakøkið umfatar í løtuni m.a. vinnulívsmenning, tjóðarbúskap, vælferð og demografi. Fullfíggjað yvirlit yvir innihaldið fæst við at lesa skeiðslýsingarnar fyri ymisku skeiðini.

Eitt serligt eyðkenni fyri samfelagsfrøði er, at tað byggir á aktuella vitan, eins og tað mesta av lærdóminum í samfelagsfrøði er grundleggjandi neyðugt fyri at vera ein vælvirkandi, demokratiskur borgari.

Samfelagsfrøði kundi hóskandi verið ein sjálvstøðug lærugrein í fólkaskúlanum, men um haldast skal fram við lærugreinini søgu/samtíð, so eru nógvir lærarar, ið áttu at fingið eftirútbúgving í samfelagsfrøðiliga partinum.

### 1.1.4. Náttúra og tøkni

Undirvísingin í náttúru og tøkni leggur grundstøði undir tey hugtøk og teir førleikar, ið næmingurin skal vera brynjaður við til undirvísingina í lærugreinunum landafrøði, alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði á 7. floksstigi og uppeftir. Lærarin skal leggja undirvísingina til rættis, so at kjarnaøkini umskarast. Til hetta krevst holl vitan í landafrøði, alisfrøði, evnisfrøði og lívfrøði, og førleikar at brúka hesar lærugreinar javnbjóðis í undirvísingini.

Í føroyska fólkaskúlanum er stórur tørvur á lærarum, ið kunnu undirvísa í náttúru og tøkni (Hansen, 2012), og átti lærugreinin at verið lærugrein, sum fólkaskúlalærarar kundu fylgt á Námsvísindadeildini. Tí má hetta setast á breddan, og eftirútbúgving skipast í náttúru og tøkni.

### 1.1.5. Støddfrøðivegleiðarar

Tað er neyðugt, at Mentamálaráðið bjóðar eina eftirútbúgving, sum kann útbúgva støddfrøðivegleiðarar, ið m.a. kunnu taka á seg arbeiðið at staðfesta og fylgja talblindum næmingum og at vegleiða starvsfeløgum í tillagaðari støddfrøðiundirvísing. Útbúgvingin og arbeiðsøkið kunnu t.d. skipast eftir sama leisti sum hjá lesivegleiðarum ella serlærarum.

Støddfrøðivegleiðarar skulu ráðgeva leiðslu og vegleiða lærarum í spurningum innan støddfrøði, bæði við atliti at skipan av undirvísing og tilfari. Støddfrøðivegleiðarin eigur at vera ein partur av førleikastovuni. Eisini skulu støddfrøðivegleiðarar skipa undirvísingarátøk fyri einstakar næmingar og veita foreldrum kunning og vegleiðing. Ein komandi støddfrøðivegleiðari eigur at

verða førleikamentur at átaka sær arbeiðið sum ábyrgdarpersónur í lærugreinini støddfrøði.

Tað er alneyðugt at førleikamenna lærarar innan støddfrøði, so at teir betur vera førir fyri at síggja styrki og trupulleikar hjá einstøku næmingunum og at taka støðu til, hvussu undirvísingin skal skipast bæði í flokkinum og hjá einstøkum næmingum.

Saman við linjulestrinum í støddfrøði á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya eiga fólkaskúlalærarar at fáa møguleika at førleikamenna seg, so teir kunnu taka ímóti teimum avbjóðingum, sum næmingalagað undirvísing setir. Í løtuni er torført at geva øllum næmingum eina hóskandi avbjóðing. Størri vitan gevur í sjálvum sær størri valmøguleikar og skapar fyritreytir fyri eini betri og breiðari undirvísing í øllum lærugreinum.

### 1.1.6. Starvsvenjingarvegleiðarar

Neyðugt er, at lærarar fáa kunnleika um arbeiðið at taka ímóti lærararalesandi í starvsvenjing, at vegleiða tey lesandi og geva afturmeldingar til Námsvísindadeilina á Fróðskaparsetri Føroya.

Lærarar í føroyska fólkaskúlanum hava ikki tikið útbúgving í at taka ímóti lesandi í starvsvenjing, og tí er tørvur á at førleikamenna lærarar, so vegleiðingin verður so kompetent sum gjørligt.

### 1.1.7. Lærararaútbúgvingin sum masterútbúgving

Vælútbúnir lærarar á masterstigi høvdu lyft føroyska fólkaskúlan á eitt hægri støði. Á hægri lærustovnum í londunum kring okkum stendur m.a. lærarum í boði at taka eina masterútbúgving í grundskúlaundirvísing. Útbúgvingin leggur stóran dent á ástøðiligan og praktiskan grundvøll, sum ger, at lærarin er stinnur á økjum sum íverksetan, samskipan, tilrættislegging og eftirmeting.

Ein tílík  masterútbúgving er snikkað til fólkaskúlaøkið, og eigur tílík útbúgving at vera á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Hetta vildi gjørt menningina av fólkaskúlanum meira málrættaða, tí hon tá er vísindaliga kjølfest.

### 1.1.8. *Leiðaraútbúgving*

Skúlaleiðarar eiga at hava leiðsluroyndir, leiðsluútbúgving, undirvísingarroyndir og holla vitan innan undirvísingarfrøði. Mentamálaráðið eigur javnan at styrkja leiðarar í teirra arbeiði. Møguleiki eigur at vera fyri at taka leiðslu-útbúgving í Føroyum, men tó eisini í samstarvi við onnur lond.

Fólkaskúlalærari, ið tekur við starvi sum skúlaleiðari, hevur tørv á at fáa eina góða leiðsluútbúgving. Lærarin er ikki útbúgvin innan leiðslu, og hann kennir ikki vanlig grundleggjandi leiðsluamboð og námsfrøðiliga leiðslu nóg væl. Tí eigur ein leiðsluútbúgving at setast á stovn á Fróðskaparsetri Føroya, har hesir leiðsluførleikar kunnu røkkast.

Leiðsluútbúgvingin eigur at fevna um grundleggjandi leiðsluhugtøk og fyri-brigdi og eigur at leggja stóran dent á nútíðar leiðslufatan innan námsfrøðiligt arbeiði. Strategisk leiðsla eigur eisini at síggjast aftur í hesi útbúgving. Útbúgv-ingin eigur eisini at fevna um netverksfundir, coaching- og mentorsamrøður og undirvísing í fakligari- og námsfrøðiligari leiðslu. Á henda hátt fáa leiðar-arnir innlit í dagsins avbjóðingar og læra seg at meta um egnar persónligar hugsanir í mun til leiðsluleiklutin.

Dugnalig leiðsla er avgerandi fyri trivnað og fakliga støði skúlans – bæði hjá lærarum og næmingum. Tí er tað sera umráðandi, at vit eisini í framtíðini hava góðar og dugnaligar skúlaleiðarar.

### 1.1.9. Málvegleiðaraútbúgving

Ein málvegleiðari má hava vitan um fyritreytir fyri tilognan av máli, og hvørji viðurskifti kunnu ávirka hesa tilgongd. Málvegleiðarin má eisini hava innlit í, hvussu mál vanliga mennir seg hjá føroyskum børnum, og hvussu henda menning sær út, tá ið málið mennir seg á óvanligan hátt.

Tørvur er á vegleiðing og kunning um málsligu menning barnsins, tí málið er fortreyt okkara sum samskiftis-, menningar- og mentanarmiðil. Kunnast má um málmenning á fyrsta máli barnsins, eins og málmenning barnsins av øðrum málum (Remmel, 2000), sum eitt nú, tá ið føroysk børn eru vaksin upp í øðrum landi, ella tá ið føroysk børn búgvandi í Føroyum í móðir- ella faðirlegg hava annað málsligt grundarlag enn føroyskt.

Málvegleiðarin má hava vitan um formligu karmarnar at arbeiða undir í dagstovni og byrjanarundirvísing og má hava innlit í ymisk ástøði um læring, t.d. hvørjir lærumøguleikar liggja í spæli í mun til málmenning. Eisini má málvegleiðarin vera førur fyri at vegleiða námsfrøðingum og lærarum í mun til námsfrøðiliga tilrættalegging úr einum siðalæruligum sjónarhorni, har hann hevur innlit í ymisk viðurskifti, sum gera seg galdandi í mun til vegleiðing um børn og/ella foreldur, sum hava føroyskt sum fyrsta og/ella annað mál.

Somuleiðis má málvegleiðarin duga at lýsa og greina týdningarmikil skifti í málsligu menningini hjá barninum við støði í kanningum av barninum, har hann eisini skal duga at meta um hesi kanningarúrslit av málmenningini saman við sínum kunnleika úr lívfrøðiligum, fatanarligum og sosialum sjónarhorni. Eisini skal hann duga at skjalprógva, eftirmeta og grundgeva fyri avgerðum sínum.

Málvegleiðarin má hava førleika at meta um, í hvussu stóran mun serlig atlit mugu takast at børnum við serligum tørvi. Eisini má málvegleiðarin hava førleika at meta um, í hvussu stóran mun serlig atlit mugu takast at børnum, sum hava føroyskt sum annað mál.

# 2.0. Førleikaskeið

Vit mæla til, at lærarar í føroyska fólkaskúlanum fáa førleikamenning í floksleiðslu, Cooperative Learning, læringarstílum og sansastimbran. Vit mæla til, at hesi førleikaskeið verða boðin út kring alt landið og eiga at standa øllum lærararum í boði. Metir ein skúlaleiðari, at hansara skúli eigur at førleikamenna seg innan t.d. læringarstílar, eigur skúlaleiðarin at fáa møguleika at fáa skeiðshaldarar út á skúlan, so at allir lærarar skúlans førleikamenna seg samstundis.

Vit kunnu vísa á onnur øki, enn tey her nevndu, og sum eisini viðkoma førleikamenning av fólkaskúlalærarum, men sum vit hava valt bara at vísa á og ikki umrøða í hesum áliti, t.d. kanning, ið Fólkaheilsuráðið gjørdi um sunna lívsførslu(2012), kanning, ið Gigni gjørdi av BMI hjá føroyskum skúlabørnum (2011) og kanning (ICSRA, 2012) um Ungt fólk.

## *2.1. Floksleiðsla*

Føroyski fólkaskúlin er í støðugari menningartilgongd, ið skal sampakka við tey krøv, børn og ung dagliga møta í okkara globaliseraða umheimi. Hetta merkir m.a. økt samstarv millum lærarar, foreldur og leiðslu. Á øllum nútímans skúlum samstarva lærarar í fakligum og tvørfakligum toymum fyri at tryggja eina samskipaða og rúmliga undirvísing. Undirvísingin í dag krevur, at næmingurin arbeiðir sjálvstøðugt og á ymsan hátt. Hetta hevur við sær, at lærarin í størri

mun má vera førur fyri at leiða flokkin soleiðis, at bæði næmingar og lærarar trívast, og næmingarnir menna seg mest møguligt. Krøvini eru høg, og kravt verður, at lærarar duga konstruktivt at samstarva um avbjóðingarnar.

Hesar avbjóðingar krevja, at lærarin hevur hollar ástøðiligar og didaktiskar førleikar, um hann skal megna at vera ein professionellur læringarleiðari. Hetta krevur, at lærarin er tilvitaður um, hvussu hann brúkar og mennir læringartilgongdir rundan um eina skilagóða floksmentan. Lærarar megna best hesa avbjóðing við at førleikamenna seg innan floksleiðslu og harvið búgva seg til at veita ta undirvísing, ið krevst av nútíðar samfelagnum (Egelund, Lauresen (2007/2008).

## *2.2. Cooperative Learning*

Umfatandi gransking hevur í nógv ár víst, at Cooperative Learning hevur aðrar fyrimunir enn eitt nú felags floksundirvísing og bólkaarbeiði (Kagan,S. Stenlev,J., 2009).

Cooperative Learning er ein sosial-konstruktivistisk læruhugsan, har læring er ein sosial tilgongd og fer fram í samstarvi við onnur. Tað er við málinum og samrøðuni við onnur, at næmingurin viðurkennir og skapar seg sjálvan og umheimin. Hesir førleikar eru hornasteinar undir førleika at vera førur fyri at virka í einum fólkaræðisligum samfelagi.

Cooperative Learning er samskiftismynstur, ið næmingar nýta, oftast í toymum ella saman við øðrum næmingum. Strategiirnar eru léttar at nýta og eru amboð, ið kunnu nýtast altíð og allastaðni. Tær bera næmingin víðari; teir kjakast, greina, loysa trupulleikar, koma við hugskotum og koma fram til loysnir.

Fyri føroyska fólkaskúlan hevði tað verið gagnligt og mennandi, at lærarar fingu møguleikan at førleikament seg í Cooperative Learning.

## 2.3. Læringarstílar

Tað er týdningarmikið, at lærarar hugsa um ymiskleikarnar hjá hvørjum einstøkum næmingi. Tá ið talan er um at arbeiða við læringarstílum, skal dentur leggjast á, hvussu næmingarnir læra best. Ein grundhugsan er, at læringin byggir á sterkastu síður næmingsins. Hetta hevur við sær, at næmingurin fær ein jaligan hugburð til skúla, eins og sjálvsálit næmingsins verður ment.

Tað eru fýra høvuðsevni innan læringarstílar: at hoyra, síggja, gera og røra. Men tað eru eisini aðrir faktorar, ið gera seg galdandi:

- fysiskir karmar (ljóð, ljós, snið, hiti v.m.)
- kenslulig og sálarlig viðurskifti (motivatión, úthaldni, ábyrgd, strukturur, hugsan í heildum, analytisk hugsan, impulsiv og refleksiv hugsan v.m.)
- sosial viðurskifti (at vera einsamøll, arbeiða tvey og tvey, bólkaviðurskifti v.m.)
- fysiologisk viðurskifti (matur/drekka, tíð á degi, tørvur á rørslu v.m.)

Bert við at undirvísa ymiskt røkkur tú øllum næmingum. Fyri at næmingalaga undirvísingina, má lærarin syrgja fyri margfaldni í undirvísingini. Flestu lærarar arbeiða við læringarstílum, men tað er neyðugt, at lærarin er tilvitaður um, hvat hann ger, og nær hann brúkar ávísar læringarstílar (Ludvig, 2011).

### 2.4. Skeið í sansastimbran

Sambært Tóru Tóroddsdóttir (2012) eru nógvir næmingar í føroyska fólka-skúlanum, ið hava trupulleikar við sansaskipanini. Hesir hava torført við at njóta undirvísingarløtuna og vera tí forðaðir í at fáa nøktandi innlæring. Hesir næmingar missa tí møguleikan at læra og mennast eins nógv og hinir næmingarnir.

SI-venjingar hava víst seg at vera ein góð hjálp hjá hesum næmingum, og tí er brúk fyri, at vit í føroysku fólkaskúlunum áhaldandi hava vælútbúnar SI-lærarar. Umframt SI-lærarar eiga allir lærarar í føroyska fólkaskúlanum at fáa kunnleika um trupulleikan, eins og ávís amboð og hugskot til, hvussu næmingar, ið hava torført við at savna seg, kunnu ogna sær betri undirvísing. Hetta kundi verið gjørt við, at lærarar fingu skeið í sansastimbran, og við at knýtt ein fysioterapeut at førleikastovuni.

# 3.0. Menning av serútbúgvingum

## 3.1. Førleikarøkt í øllum ískoytisútbúgvingum

Lesivegleiðarar, AKT-lærarar, orðblindalærarar, serlærarar, SI-lærarar og onnur hava javnan brúk fyri at fáa ment og dagført sín førleika. Tað, sum er serstakt fyri orðblindalærararnar útbúnir í 2011, er, at teir eru útbúnir at undirvísa vaksnum. Tó eru fleiri teirra eisini útbúnir fólkaskúlalærarar, og hava fleiri teirra eisini serútbúgving sum lesivegleiðari og/ella serlærari. Berast má so í bandi, at orðblindalærarar kunnu virka í fólkaskúlahøpi, tí tað er avgerandi, at hetta økið eisini verður røkt, so orðblind kunnu fáa hjálp skjótast gjørligt. Ein skipan eigur tí at verða sett í verk, so at ein støðug førleikamenning innan ískoytisútbúgvingarnar fer fram. Evnisdagar, har lærarar við ískoytisút-búgvingum hava møguleika at arbeiða við spurningum og avbjóðingum,

eiga árliga at verða fyriskipaðir. Hetta eigur at verða gjørt í samstarvi við áhugafeløgini fyri serútbúgvingarnar.

Lærarar við ískoytisútbúgvingum eiga eisini at fáa møguleika at fylgja viðkomandi undirvísingarmodulum og fyrilestrum á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Vit mæla til, at við jøvnum millumbilum stendur góðkend førleikamenningarútbúgving við ECTS stigum og próvtøkuummæli fólkaskúlalærarum í boði. Hetta vildi gjørt førleikamenningina meira málrættaða og tryggjað hóskandi støði.

### 3.1.1. Telduvørðir

Føroyski fólkaskúlin hevur verið væl við á telduøkinum. Men tó er tørvurin á eini eftirútbúgving til telduvørðir alstórur, tí telduvørðir eru lyklapersónar, tá ið teldur, samvirknar talvur og teldutøkt undirvísingartilfar skulu brúkast á fullgóðan hátt í undirvísingini. Tørvur er á, at telduútbúgving verður sett í verk skjótast gjørligt, tí fleiri skúlar eru, ið hava tørv á útbúnum telduvørðum. 8 ár eru liðin, síðani seinastu telduvørðirnir tóku hesa útbúgving. Vandi er fyri, at vantandi kunnleiki á telduøkinum gerst ein bági fyri undirvísing við tíðar-hóskandi amboðum, um skúlarnir ikki hava útbúnan telduvørð. Telduvørðurin er eisini týdningarmikil liður í Námsfrøðiliga deplinum.

### 3.1.2. Skúlavegleiðarar

Í § 24 í fólkaskúlalógini er ásett, at sett verður á stovn ein skúlaveg-leiðara-skipan at ráðgeva og leiðbeina næmingum í sambandi við útbúgvingar- og

starvsval teirra. Í kunngerð er skúlavegleiðaraskipanin og arbeiðsøkið nærri lýst.

Tað hevur í mong ár verið í umbúna at skipa eina vegleiðaraútbúgving fyri alt undirvísingarverkið. Talan er um skipan av einari tveystreingjaðari vegleiðing, ið fer fram í skúlum, á stovnum, hjá áhugafeløgum o.ø, eins og eina vegleiðingarstovu, ið hevur yvirskipaða og samskipandi ábyrgd av allari vegleiðing í Føroyum.

Mest týðandi tátturin í vitanarsamfelagnum er útbúgving. Hetta treytar eina dygdargóða vegleiðing innan fjølbroytnið í útbúgvingarmøguleikunum, um samfelagið skal fylgja altjóða menningini. Landsstýrismaðurin í mentamálum setti í januar 2007 ein arbeiðsbólk, ið skuldi kanna alla vegleiðingarskipanina í Føroyum við atliti at nýskipan. Hesin arbeiðsbólkur lýsir, hvussu vegleiðara-útbúgvingin eigur at verða skipað.

Tað er alneyðugt at skipa eina útbúgving fyri lestrarvegleiðarar so skjótt sum til ber, tí eisini her eru nógv ár liðin, síðani seinastu skúlavegleiðararnir fingu útbúgving. Fleiri skúlavegleiðarar eru farnir frá vegna aldur ella fara frá í næstum, og tí er stórur tørvur á nýggjum skúlavegleiðarum ella lestrar-vegleiðarum, sum framyvir verður felagsheitið fyri lestrar- og yrkisvegleiðing.

### 3.1.3. Skúlabókavørðir

Góð og kveikjandi vegleiðing er týðandi fyri føroyska fólkaskúlan. Tørvur er á, at bókavørðir fáa eina eftirútbúgving, ið gevur teimum kunnleika til teldu-bøkur, internet, undirvísingarportalar, kelduviðgerð og námsfrøðiligar møgu-leikar við dagsins hentleikum. Høvuðsuppgávan er sambært fólkaskúlalógini § 23 at menna skúlabókasavnið til Námsfrøðiligan tænastudepil, og við hesum allan skúlan sum eina lærandi skipan.

Ein vælvirkandi Námsfrøðiligur tænastudepil er viðvirkandi sum grundarlag at fremja endamál fólkaskúlans. Við fjølbroyttum tilfari er tað ein góð hjálp at fremja t.d. næmingatillagaða undirvísing, bólkaarbeiði og verkætlanir.

Tað er umráðandi at fáa Námsfrøðiliga tænastudepilin sjónligan á staðnum, so at vit fáa næmingin at taka lut, skapa og vísa áhuga fyri mentanarligum arbeiði. Hetta eru eisini tankarnir í fólkaskúlalógini um skúlan sum mentan-ardepil. Tað er lítið at ivast í, at skal skúlin megna at stimbra andslív, menna samveru, nýskapan og kveikja orðaskifti um mentanar- og samfelagsligar metingar, so er Námsfrøðiligi tænastudepilin í eini lyklastøðu. Skúlabóka-vørðurin skal útbúgvast at røkja sín part á Námsfrøðiliga tæn-astudeplinum.

### 3.1.4. Kreativu/handaligu lærugreinarnar

Munandi raðfesting av kreativu/handaligu lærugreinunum í føroyska fólka-skúlanum er neyðug, og dentur skal tí leggjast á hetta økið sum skjótast. Hesar lærugreinar eru á mangan hátt íblástur hjá næmingum okkara. Hesar bæði styrkja teirra sjálvsvirðing og sjálvsmenning. Ætlanin við at samansjóða tónleik, smíð, evning, hondarbeiði og heimkunnleika saman sum P-fak, var m.a. at fáa lærarar at síggja virðið í heildini. Skal hetta eydnast, krevjast framúr umstøður og lærarar við góðum førleikum.

Handarbeiði, smíð og evning hava nógv í felag. Í øllum trimum greinunum skal undirvísingin viðvirka til at menna hugflog næmingsins, at styrkja teir í treysti til sín sjálvs, at arbeiða sjálvstøðugt og í felagsskapi. Undirvísingin skal búgva næmingin til samavgerð og samábyrgd. Næmingarnir skulu læra at nýta hugflog, amboð og læra at kenna tilfar og læra ymiska tøkni at nýta í tilvirkan og tilskipan. Dentur verður  lagdur bæði á tað listarliga og tað handaliga. Eftirútbúgving má fremjast at førleikamenna lærarar at undirvísa í og at rúma

hesum, ásannandi, at kreativar lærutilgongdir byggja uppundir alla læring barna.

### 3.1.5. Tónleikur, sangur, dansur og drama

Undirvísing í tónleiki, sangi, dansi og drama krevur bæði didaktiskar og fakligar førleikar.  Sum í øllum øðrum lærugreinum krevst vitan um fjølbroytni og virkna lut næminganna. Í eitt nú tónleiki verður m.a. spælt, sungið, dansað og framført. Lært verður at handfara ymisk ljóðføri og at spæla ymiskan ljóðføristónleik hvør sær og saman, eins og næmingarnir læra at framføra. Eisini verður komponerað og yrkt, og tónleikur verður lýstur og greinaður. Sagt verður frá tónleikasøgu og tónleikasløgum, og lurtað verður eftir ymiskum tónleiki og undirvíst verður í tónalæru.

Tónleikur, sangur, dansur og drama eiga at vera ein sjálvsagdur partur av undirvísingini í øllum lærugreinum. Tí er neyðugt at eftirútbúgva t.d. tónleika-lærarar bæði at síggja tónleikaundirvísing sum eina serstaka lærugrein og sum partur av undirvísing sum heild. Allar kreativar lærugreinar eru eisini sjálvsagdur partur av allari skúlagongdini og eiga tí at koma inn sum ein natúrligur partur í eftirútbúgvingini av øllum lærugreinum.

### 3.1.6. Heimkunnleiki

Heimkunnleiki víkur í ávísan mun frá hinum lærugreinapørtunum í handverk og list, men væl ber til at arbeiða tvørgreinaligt saman. Heimkunnleiki liggur møguliga tættari at lærugreinunum lívfrøði og ítrótti, og tí áttu vit eisini at bjóðað eina eftirútbúgving, ið tók støði í samspælinum millum hesi trý. Vit meta sostatt ikki, at heimkunnleiki bert eigur at flættast saman við eftir-

útbúgvingini hjá hinum handverk og list-lærugreinunum, men eisini verður tikið upp saman við lívfrøði og ítrótti, har heilsurøkt og týdningurin av sunnum livihátti sambært Gigni, 2011 & Fólkaheilsuráðið, 2012 eru týðandi tættir.

### 3.1.7. Útbúgving í undirvísingarmiðlum

Undirvísingartilfar eigur ikki at vera statiskt, men skal kunna broytast í mun til flokk og næming. Vit hava eitt fámanna móðurmál og ein avmarkaðan hóp av fólki, sum kunnu menna undirvísingartilfar okkara. Lærarar gera hvørt ár nógv tilfar, sum er væl úr hondum greitt. Vit eiga tí at førleikamenna lærarar í at framleiða undirvísingarmiðlar, so at allir undirvísingarmiðlar verða fjølbroyttir og á høgum didaktiskum støði. Hetta kann gerast í samstarvi við Nám.

Útbúgvingin í undirvísingarmiðlum eigur at geva luttakarunum bestu førleikar og vitan um, hvussu tilfar skal leggjast til rættis, so at hetta gevur eitt boð uppá:

- *Hvat* næmingurin skal læra (vitanarparturin av tilfarinum).
- *Hvussu* næmingurin skal læra tað (læruparturin av tilfarinum).
- *Hvussu* undirvísingin skal leggjast til rættis, gjøgnumførast og eftirmetast (undirvísingarparturin av tilfarinum).

Tað er sera umráðandi, at tilfar, sum verður gjørt, styðjar uppundir kunnleikaøkini, tí tað stuðlar uppundir lesibæri og økir harvið læringina og fataninga hjá lesaranum, bæði teimum, sum eru væl fyri, og teimum, sum hava lesitrupulleikar. Fyri at skilja og fáa sum mest burturúr einum teksti, samlar lesarin sína vitan og tulking, og í tí sambandi verður ofta tosað um sjey

kunnleikaøki, sum eru: Bókstav-ljóð-kunnleiki, Orðkunnleiki, Vitan um tekstir, Vitan um mál, Tekstminni, Vitan um heimin, Metatilvit.

# 4.0. Ábyrgd og skipan av førleikamenning fólkaskúlans

Mentamálaráðið er arbeiðsgevari og eigur at tryggja lærarum og skúlaleiðarum nøktandi umstøður fyri fakligari og námsfrøðiligari førleikamenning. Eftirútbúgving hjá fólkaskúlalærarum er ásett í rundskrivi nr. 1 um eftir- og framhaldsútbúgving av lærarum fólkaskúlans frá 9. juni 1992. Rundskrivið hevur heimild í § 25, stk. 2 í Løgtingslóg nr. 69 um læraraútbúgving frá 28. mai 1980. Henda lóg fór úr gildi 17. mai 2012, men samstundis var ásett í § 2 stk. 2 í Løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012 um broyting í Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya, at fyriskipanir, sum eru ásettar við heimild í Ll. nr. 69 frá 28. mai 1980 um læraraútbúgving, verða verandi í gildi, til tær verða broyttar ella settar úr gildi við heimild í lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Sostatt eru reglurnar í nevnda rundskrivi framvegis í gildi, men Mentamálaráðið hevur arbeitt við at skipa ein eftirútbúgvingardepil, har málið er, at øll starvsfólk í skúlum og á stovnum, sum Mentamálaráðið varðar av, í framtíðini skulu hava møguleika at eftirútbúgva seg á einum og sama staði.

Játtan til eftirútbúgving hjá lærarum fólkaskúlans, umframt játtan til pedagogikum hjá miðnámsskúlalærarum, ið er lógarkrav fyri at verða sett/ur í fast starv sum miðnámsskúlalærari, er sett á fíggjarlógina sum konta undir Fróðskaparsetri Føroya, men Mentamálaráðið hevur framvegis ræðisrætt á kontuni. Játtanin á hesi kontu er í løtuni umleið 2,67 mió krónur.

Í § 8 í rundskrivinum er ásett um fígging, at Mentamálaráðið játtar eftir- og framhaldsútbúgvingini eina hóskandi peningaupphædd av játtanini til fólkaskúlan. Í hesum sambandi er neyðugt at vísa á, at peningaupphæddin á kontuni til eftirútbúgving eigur at hækka, tí fólkaskúlin fær bert ein part av játtanini. Talan er ikki um stóra peninganøgd at førleikamenna bæði lærarar

og leiðslu fólkaskúlans. Umráðandi er tí eisini, at henda upphædd verður umsitin so skynsamt sum til ber, og ansast má eftir, at hesin peningur, nú leisturin væntandi verður broyttur, fer til sjálva førleikamenningina og ikki til t.d. umsiting. Hyggjast má tí at, hvør stovnur er førur fyri at skipa fyri førleikamenning av fólkaskúlalærarum, uttan at nýta nakað av týdningi av hesi eftirútbúgvingarjáttan til umsiting og til fleiri starvsfólk.

Týdningarmikið er at oyramerkja pening til at førleikamenna fólkaskúlalærarar. Vit mæla til, at ráðleggingarnevndin kannar tørvin av førleikamenning, og hvussu førleikamenningin verður skipað, so at ræðisrætturin av játtanini ikki verður býttur út á fleiri stovnar. Sostatt má hyggjast eftir, hvør stovnur best lýkur treytirnar at umsita játtanina til førleikamenning og fær mest møguligt burtur úr játtanini beinleiðis at brúka til skeið og eftirútbúgvingar.

Nám er ein stovnur, sum virkar beinleiðis undir Mentamálaráðnum, og hevur tí eitt dynamiskt samstarv við ráðið. Nám hevur hollan kunnleika at veita styttri eftirútbúgvingarskeið, og røkir í dag meginpartin av hesum skeiðsvirksemi fólkaskúlans.

Á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya er møguleiki at bjóða eftirútbúgvingar og aðra førleikamenning fyri fólkaskúlalærarum einsamøllum og sum samlestur við lærarralesandi.

Tann stovnur, sum fer at hava ræðisrættin yvir játtanini til førleikamenning av m.a. fólkaskúlalærarum, eigur at samstarva við ráðleggingarnevndina, ið skal umboða Nám, Námsvísindaligu deildina á Fróðskaparsetri Føroya, Mentamálaráðið, Føroya Lærarafelag og Skúlaleiðarafelagið. Hesi mugu finna fram til, hvør tørvurin er á førleikamenning í føroyska fólkaskúlanum, og hvørji nýggj útbúgvingarøki eiga at verða sett í verk.

Vit mæla til, at skeið og útbúgvingar verða keypt frá Fróðskaparsetri Føroya, um førleikin finst har – annars frá øðrum veitarum í Føroyum og uttanlands. Um skeið ella útbúgvingar verða keypt frá øðrum veitarum, eigur Fróðskaparsetur Føroya og Nám at fáa lut í førleikamenningini. Tað er umráðandi, at gjøgnumskygni er í førleikamenningarskipanini, so lætt er at síggja, hvørjir møguleikar eru hjá lærarum at søkja um at sleppa á skeið og til eftirútbúgvingar.

## 4.1. Mentamálaráðið

Mentamálaráðið, ið hevur um hendi dagliga samstarvið og samskiftið við skúlarnar, ráðleggur tímajáttan, reglur og yvirskipaða menning, eigur at hava eitt tætt samstarv við eftirútbúgvingarstovnarnar.

Mentamálaráðið hevur til uppgávu at gjøgnumføra tann skúlapolitikk, sum landsstýrismaðurin til eina og hvørja tíð setur í verk. Mentamálaráðið má hava eitt tætt samstarv við eftirútbúgvingarveitarar og raðfesta førleikamenningina, so at hon er samsvarandi teimum visjónum, ið eru um fólkaskúlaøkið.

Soleiðis er Mentamálaráðið ein týðandi liður, tá førleikaleisturin skal skipast. Í felag mugu allir partar taka atlit at dagliga virkseminum í skúlunum, so førleikamenningin er so smidlig sum gjørligt.

## 4.2. Fróðskaparsetur Føroya

Mælt verður til, at Fróðskaparsetur Føroya framhaldandi er ein veitari av skeiðum og útbúgvingum at førleikamenna føroyska fólkaskúlan. Førleikamennandi skeið og útbúgvingar, ið Fróðskaparsetur Føroya kann hugsast at veita, eru m.a.:

- Linjulestur fyri útbúnar lærarar saman við læraralesandi
- Uppstigan til bachelor
- Master útbúgving
- Kandidat útbúgving
- Førleikamenning innan verandi og nýggj serøki
- Námsfrøðilig skeið
- Kreativ/handalig førleikamenning

## 4.3. Nám

Annar veitari er Nám. Skeiðini, sum Nám kann hugsast at veita, eru tey somu, sum tey hava veitt frammanundan. Eisini er Nám ført fyri í tøttum samstarvi við skúlarnar at hava menningarvirksemi við atliti at nýggja námsfrøðiliga rákinum. Hetta kann Nám eins og í dag gera í einum dynamiskum samstarvi við skúlarnar.

## 4.4. Skipan

Øll førleikamenning, bæði skeið og útbúgvingar, eigur at verða ráðløgd og lýst í góðari tíð. Førleikamenningin skal leggjast inn í ársverkið hjá hvørjum einstøkum lærara, og soleiðis ávirka undirvísingina í skúlanum sum minst. Tímarnir til skeið skulu telja 85 minuttir, soleiðis at lærarar fáa fyrireikingartíð. Hetta eigur at vera galdandi fyri øll skeið í føroyska fólkaskúlanum.

Hetta kann skipast sum styttri og longri skeið og sum útbúgvingar. Vit mæla til, at raðfestingar verða gjørdar, og at ráðleggingarnevndin orðar góðar grundgevingar fyri raðfesting av skeiðum.

Lærarar, ið velja at førleikamenna seg á Námsvísindadeildini, eiga í størstan mun at kunna taka skeið saman við teimum lesandi. Fyri at lærarar skulu kunna taka linjulestur saman við lærarालesandi, eiga tímarnir at liggja seinnapart á degi, so minst órógv verður á undirvísingina í fólkaskúlanum. Lærarar mugu fáa hóskandi niðurskurð í tímatalvuni, og eigur linjulesturin í tann mun, tað letur seg gera, at kunna takast sum linjulestur á internetinum.

Eisini eigur førleikamenning at vera givin úti í skúlunum fyri øllum lærarum í Føroyum. Í skúlaárunum 2011-2013 skipaði Nám fyri førleikamenning í fakligari lesing og kunningartøkni. Vit mæla til at nýta henda leistin framyvir.

Í teimum førum ein skúlaleiðari metir, at hansara lærarar hava tørv á at førleikamenna seg innan ávís øki, t.d. foreldrasamstarv, læringarstílar, næmingalagaðari undirvísing, rørslum í undirvísing, toymisarbeiði v.m., eigur skúlaleiðarin at fáa møguleikan at biðja skeiðshaldarar koma út á skúlan og førleikamenna allar lærarar skúlans samstundis. Á tílíkan hátt kann førleikamenningin koma øllum skúlanum til gagns. Tá ið allur skúlin í felag verður førleikamentur, eru góðir møguleikar fyri at seta førleikamenningina skjótt í verk og at eftirmeta og tillaga førleikamenningina javnan.

# Bókmentir

Christensen, P.  B. v.fl. (red.) (2009). Skolens nye lederskab. København: Dafolo.

Debes, S. (2006).  *Færøske børn og unges læsevaner.* Ritgerð - Master i Børnelitteratur

Dunn, R., Griggs, S. A., Olson, J., Gorman, B., & Beasley, M. (1995). A meta-analytic validation of the Dunn and Dunn model of learning-style preferences. *Journal of Educational Research, 88*, 353–361.

Dunn, R., Denig, S., & Lovelace, M. (2001). Multiple intelligences and learning styles: Two sides of the same coin or different strokes for different folks. Teacher Librarian. *The Journal for School Library Professionals, 28*(3), 9–15.

Egelund, N. & Fibæk Laursen, P. Det forsømte lederskab, *Asterisk nr. 38,* 2007/08.

Egelund, N. & Hermansen, M. (2010), Uroen stopper når læreren bliver professionelle ledere, *Asterix 51.*

PISA-undersøgelsen 2009: [http://www.uvm.dk/~/media/Files/Udd/Folke/PDF10/101207_PISA_2009_Skolestyrelsens_beskrivelse_af_resultaterne.ashx](http://www.uvm.dk/~/media/Files/Udd/Folke/PDF10/101207_PISA_2009_Skolestyrelsens_beskrivelse_af_resultaterne.ashx).

Fólkaskúlalógin ein avbjóðing (2001)www.mmr.fo

Fólkaheilsuráðið (2012). Kanning: Matur á dagstovnum. *www. folkaheilsa.fo*

Førleikatørvur og skipan. Tilmæli frá arbeiðsbólkinum í sambandi við TALIS-kanningarnar. *www.mmr.fo*

Gigni (2011): Kanning av BMI hjá føroyskum børnum. *www.gigni.fo*

Kagan, S. & Stenlev, J. (2009). *Undervisning med samarbejdsstrukturer Cooperative Learning.* København: Alinea.

Jensen, & J. Hansen, H. (13.02.2012) Kunning í Fólkaskúlaráðnum.

Hermansen, M. (2010) *Spilleregler i klassen – læringsledelse i teori og praksis*. København: Akademisk forlag.

Jensen, E. & Løw, O. (red.) (2011). *Klasseledele – nye forståelser og handlemuligheder.* København: Akademisk Forlag.

Johannessen, J. A. & Olsen, B. (2008). *Skoleledelse – skolen som organisation* Oslo: Fakbokforlaget.

Jónasson, Jón Torfi (2011). *What should be the role of TEIs and how might they be more active?*

Krejsler, J. B. & Moos, L. (red.) (2008). *Klasseledelse – magtkampe i praksis, pædagogik og politik*. København: Dafolo.

Ludvig, M. (07.11.2011) Kunning í Fólkaskúlaráðnum.

Talis-tengd kanning 2009: Fatan av praksis á skúlaøkinum í Føroyum. *www.mmr.fo*

Nielsen, P. R. (2010). *Professionssamarbejdet mellem lærere og pædagoger*. København: Dafolo.

Qvortrup, L. (1998). *Det hyperkomplekse samfund. 14 fortællinger om informationssamfundet.* København: Gyldendal.

Rasmussen, Jens (2008). Hvad ved vi om den gode lærers praksis? Í: *UP Nr. 8/2008*

Remmel, B.(2000): *Sprogblanding og sprogbevidsthed*. Ritgerð í føroyskum. Roskilde.

Róin, A. ( 03.10.2011) Kunning í Fólkaskúlaráðnum

Sigfússon, J & Gaini ,F. *Ungfolk/Ungt fólk*. Føroysk/íslendsk kanning 2012. ICSRA Reykjavik University.

Schmidt, S. E. & Boström, L.  2011). *Læringsstile*. København: Munksgaard.

Tóroddsdóttir, T. (1999). *Rura. Rørslumenning og sansaskipan hjá føroyskum børnum*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Tóroddsdóttir, T. (13.02.2012) Kunning í Fólkaskúlaráðnum.

Tilmæli frá Pisa – arbeiðsbólkinum (2006) *www.mmr.fo*